Ørsmá- og monopolkapitalisma

Sum flestu bløð, hevur Dagblaðið eisini nakrar nýárshugleiðingar.

Í blaðstjóragrein nevnd: »Árið sum fór — Árið sum kemur«, verður ymiskt skilagott borið fram. Niðurstøðan av nýárshugleiðingum Dagblaðsins er: at samstundis sum vit hava stigið inn um gáttina til tað nýggja árið, eru vit á ferð ígjøgnum tað nýggja árið. Henda niðurstøða fær Dagblaðið at taka soleiðis til orða: »Og eitt av endamálunum er at syrgja fyri, at tey ringast stillaðu verða ikki hótt við arbeiðsloysi, og skuldi nakað tílíkt hent, at hesi eisini verða tryggjað á ein ella annan hátt«.

Onki ringt um endurgivnu orð Dagblaðsins. Tað er rætt, at tá sparitiltøk og skamtanir verða settar í verk, so eru tað altíð verka- og fiskimannastættin, ið verða raktar meinast. Tað er at fegnast um, at Dagblaðið og Fólkaflokkurin? hava slíkan samhug við teimum ringast staddu. At hesin samhugur er erliga meintur, ivist eg ikki í. Men tað sum ein eigur at leggja høvuðsdentin á er: hví tað í einum av heimsins ríkastu samfeløgum eru stættir, sum eru illa staddir, og um hetta er neyðugt.

Tann flokkur, sum Dagblaðið er málgagn fyri, Fólkaflokkurin, er lívverja hjá tí sokallaða privata iniativinum t.e. privatkapitalismuni. Tann hugsan, sum fólkaflokkurin politiskt umboðar, er tann sama, sum er orsøk til at heimurin í dag stendur í óføri. Framleiðslan hevur onki annað endamál enn meira vinning, meira framleiðslu, meira vinning. Tað er hesin framleiðsluháttur, sum hevur eydrænt náttúrríkidømi jarðarinnar, dálkað og eitrað jørð, himmal og hav. Fremstu vísindamenn heimsins hava ávirkað okkum, og leiðandi statsmenn eru fullvísir í, at verður ónyttuframleiðslan ikki støðgað nú, og tað er í evstu løtu, verður galin endi. Papnæsa- og yvirflóðsframleiðslan heldur áfram. Tveit burtur og keyp nýtt-mentanin verður sitandi í hásætinum. Og har verður hon sitandi eins longi og heimskapitalisman ræður.

Tað kann tykjast heldur langt lop frá ringast stillaðu stættum í Føroyum til heimskapitalismuna. Men tað er vert at geva gætur, at sama grundhugsan sum heimskapitalisman hvílir á byggir føroyski Fólkaflokkurin á. Tað er henda grundhugsan, sum er atvoldin til at heimurin stendur í óføri, og tað er henda grundhugsan, sum ger tað møguligt hjá Dagblaðnum at harmast um ey ringast stillaðu í Føroyum.

Tað er bert ein leið, ið kann gera spádómar vísindamanna til skammar, tað er bert ein leið, ið kann leggja framleiðslu heimsins so til rættis at hon bert tænir fólkinum og ikki kapitalinum, tað er tann sosialistiska leiðin.

BRØV



Tað vera ikki vit fámentu, sum á hesum oyggjum búgva, ið koma at bjarga heiminum og avtaka . heimskapitalismuna. Men vit kunnu gera okkara part. Men vit seta á stovn eitt fyrimyndarligt sosialistiskt samfelag her í Føroyum, eitt samfelag, hvar framleiðslan er undir fólksins valdi og í fólksins tænastu, eitt samfelag, hvar eingin er »ringast stillaður«, men hvar øll eru eins væl stillaði.

axel skoubo

P.S. Góði Knútur! Um tú hevur nakra viðmerking, vilt tú so ikki gea mær tann beina, at halda teg til tað sum hesar reglur umhandla, og ikki lata teg freista at svara í eystan tá eg spyrji í vestan, ikki lata teg freista at skriva um rithøvundar og sovjetiskan píkatráð. Tú ert jú ein skilamaður. Gamal og góður politikkari, so av tær vænti eg ikki at tú stillar teg í útn.-hornið at rópa Rusland, Ungarn og Tjekkoslovakiið. Og eg skal geva tær lyfti um, at eg ikki skal stilla meg í landsynn.-hornið at rópa Spania, Grikkaland, Portugál og Dominikanska lýðveldið.

a. s.

Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.

Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll sløg av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ

v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

Tað er NÚ ið ræður um at spara!

Einki útlit er til, at oljukreppan verður av í bræði, heldur tvørturímóti. Tað kann tí ikki nóg inniliga verða heitt á hvønn einstakan um alt landið at sýna størsta sparsemi við olju, bensini og petroleum og at avmarka el-nýtsluna mest møguliga.

Hetta er bráðneyðugt, skal eydnast at tryggja hvørjum húsarhaldi sær og landsins vinnu hita, ljós og orku.

Hvør einstakur eigur tí at geva hesum spariráðum ans:

Snarið fyri hitanum, tá ið eingin er við hús — spard verða 3% í olju. Um tygum snara niður í 6 tímar hvønn dag, brúka tygum 3% minni olju.

Stovuhitin nýtist ikki vera meira enn 21°, og tygum spara 10% olju. Men 19—20° er mangan nóg mikið. Snarið fyri hitanum um náttina. Um allir radiatorar eru kaldir í 8 tímar, spara tygum 4% olju.

Minnist til at lata upp radiatorarnar so spakuliga, tá ið tygum koma aftur til hús.

Tættið vindeygu og hurðar væl. Umleið 5% av øllum oljuhitanum setur út gjøgnum rivir fram við vindeygu, hurðar og bróst, og samstundis setur køld luft inn um — vita eftir við handabakinum!

Olja verður eisini nýtt til el-hita. Um tygum hava snarað fyri hitanum í stovuni fyri at spara olju, so hjálpir lítið, um tygum afturfyri tendra el-ovnin.

Brúkið el-komfýrin minst møguliga og kókið ikki meira vatn, enn brúk er fyri.

Kuldaskápið og frystirúmið brúka meira streym enn tygum halda. Við tjúkkum ísi omaná køli-elementunum verður upp aftur meiri streymur brúktur, tí eigur at verða avísað regluliga. Latið ongantíð hurðarnar vera opnar. Tað nýtist ikki vera kaldari enn 5° í kuldaskápinum og 18° í frystaranum.

Umleið 10% av el-nýtsluni fer til ljós; havið ikki tendrað í stovu, har eingin er inni. Brúkið eina sterka peru heldur enn fleiri veikar.

Arbeiðir oljufýrurin ikki sum hann eigur, kann lættliga koma at verða 5% ovurnýtsla av olju. Kønur maður eigur at hyggja at fýrinum og stilla hann beint.

OLJUSPARINEVND LANDSINS

⁂

Oljuskamtan o. a.

Harri blaðstjóri! Ger so væl at hýsa mær nøkrum fáum orðum í SOSIALINUM.

Føroyingar hava livað nú í mong ár eitt gott lív, hava ikki liðið sakn av nøkrum slag, og tann ungi sum er í mandómsárunum hevur tjent nógvan pening, bæði burturi og heima.

Tá nú óløgir bróta inn yvir so at siga øll lond í heiminum, so kunnu vit ikki vænta annað enn at vit fáa ein skvætt eisini.

Kunngerðin frá landsstýrinum um bann móti koyring sunnudag, tikist illa at vera dámd og lesarabrøv eru hvassliga ímóti hesum banni, og menn tykjast høgga í landsstýrið fyri hetta bann. Eg haldi at landsstýrið hevur gjørt púra beint í hesum føri, um bensinið skal verða skamtað, gongur tað mest útyvir teir, ið koyra við bili til arbeiðis; vildi tað ikki verið ein órættur, at teir í hundratals stuttleikabilar skulu fáa so mikið bensin sum teir, ið bert brúka sínar bilar at koyra til arbeiðis við, at skamta bensinið er púra og aldeilis óhóskandi, uttan so, at kommunustýrini geva undantksloyvi gjøgnum landsstýrið. bert ein formaður í eini kommunu má *ikki* hava mandat til at geva slík loyvi, men eitt fleirtal í kommunini má vera fyri hesum loyvi, tá tað skal gevast.

Mangt verður skrivað, ein skrivar at hann fær nú ikki gingið í kirkju uttan við bili, ájú, er tað hugur at fara í kirkju, og hevur ein andaliga megi til tað, so skal tað nokk bera til at koma til kirkjuna, kirkjur vóru áðrenn bilarnir komu higartil.

Vónandi hugsar løgtingið og landsstýrið seg gjølla um áðrenn ein møgulig skamtan verður sett í gildi. Bann móti sunnudagskoyring hava fleiri lond longu undan okkum sett í gildi, men man ikki henda misnøgd, ið her kemur til sjóndar, verða nakað politiskt litað, eitthvørt má havast at skutla landsstýrið við, mangt er í neyðini nýtt, sigur orðatakið, ja, tað bragdið landsstýrið gjørdi við víðkanini av fiskiøkinum, verður eisini dømt til heljar av mótstøðumonnum, eg haldi tað var eitt satt bragd, bert við tingingararbeiði at fáa eitt størri øki uttanfyri 12 míla markið, sum alt økið er innanfyri tað, her skuldi ein trúð, at politikkarar vórðu sømiligir menn, at teir allir sum ein søgdu hetta at vera eitt gott stig á ti røttu leiðini, men gakk, teir rumbla og buldra bygd úr bygd at sverta landsstýrið fyri hesa roysnisgerð. Vit eru allir samdir um at fáa allan landgrunnin í minsta lagi innanfyri okkara fiskimark, men tað má verða skil í okkara framførslu av hesum kravi, at taka eitt toskakríggj upp við Bretland ella Týskland eru vit ikki førir fyri, og neyvan vildi tað verið okkum til nakran fyrimun, um so varð. Tað er sjálvsagt, at seta hesar tjóðir sítt fiskimark út, gera vit tað sama, men at bjóða av, tað kann als ikki verða klókt, her hevur landsstýrið, ella kanska rættari at siga samgonguflokkarnir, eina púra beina støðu, kann fiskimarkið vinnast við al tjóða avgerð so eru vit best farnir. Ja, vit megu øll biðja Gud bevara okkum frá, ikki at hava lov at veiða fisk uttan bert í hesum neyðars hylunum sum okkara oyggjar liggja í, ja so kemur gamla bóndatíðin aftur.

Úti í sjónarringinum eru myrk skýggj í dag, og tað daprasta av øllum er tann ósemja, ið er millum okkara fámenta fólk og serstakliga millum okkara ppolitikkarar. Kenni tykkara politikkarar. Kenni tykkum betur um, hondin á veggi[illegible] er nærum byrjað at skriva.

Gamal fiskimaður

[illegible] hilar badar [illegible] tilráðing | ta makt, sum tað verðuga nev- [illegible] urnar av ti, prisráðið ger, og tað hvílir á ofullfiggjaðum | triggjadagsblaðið.